| Býráðsfundir<br>23. apríl 2015 | Blað nr.: 12187 |
| --- | --- |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 23. apríl 2015 **Kl**. 17:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Rúni Djurhuus
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørg Dam
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrún Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Jónsvein Lamhauge

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen, sum hevði farloyvi
Bjørghild Djurhuus, sum hevði farloyvi

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# Mál fyri opnum hurðum

## 63/15 Uppsamlingsmál ár 2015 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 63/15 | 15/00279-10 |

**Málslýsing**:
Bjørghild Djurhuus hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bjørg Dam, eru loknar.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt.

## 64/15 Uppsamlingsmál ár 2015 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 64/15 | 15/00279-11 |

**Málslýsing**:
Halla Samuelsen hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt.

# 65/15 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.02.2015 | 47/15 | 15/00579-1 |
| 2 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 22/15 | 15/00579-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 25.03.2015 | 85/15 | 15/00579-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 88/15 | 15/00579-1 |
| 5 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 65/15 | 15/00579-1 |

**Málslýsing**:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Góðkent.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent.

# 66/15 Meirinntøkur fyri 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.03.2015 | 84/15 | 15/01016-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 89/15 | 15/01016-1 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 66/15 | 15/01016-1 |

**Málslýsing**:
Í ársroknskapinum 2014 kann staðfestast at skattainntøkurnar eru góðar 53,7 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at meirinntøkurnar verða brúktar til fígging soleiðis:
Býráði samtykti 18. sep. 2014 at fíggja keyp av ognum undir Kongavarða við meirinntøkum í 2014 við 14,5 mió. kr. Keyp og sølu kontan var í undirskotið við 12,7 mió.kr. í 2014. Mælt verður til at hetta undirskotið somuleiðis verður fíggjað av meirinntøkunum.

Meirnýtsla hevur verið á einstøkum rakstrarstøðum, sum ikki hava fingið neyðuga játtan. Mælt verður til, at játta pening til part av meirnýtslum fyri hesi rakstrarstøð:

| | | |
|---|---|---|
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 1,4 mió. kr. |
| 2810 | Fíggjarligt fríplass | 1,5 mió. kr. |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | 1 mió. kr. |
| 3134 | Frítíðarskúlin í Hoyvík | 1 mió. kr. |
| 3129 | Barna- og Ungdómshúsið Látrið | 700 t.kr . |
| 3199 | Regulering barnatal | 3,6 mió. kr. |
| | | |
| 4122 | Skúlin við Løgmannabreyt | 1,2 mió.kr. |
| 5717 | Ítróttaranlegg | 1 mió. kr. |
| 7210 | Brandstøðin | 500 t.kr. |

Á konto “byggibúningar í gerð” eru lidnar verkætlanir sum standa við einari saldo.

Verkætlanirnar eru samtyktar sum útlegg og skulu tí hava eina fígging. Samlaðu útleggini vóru 31.12.2014 79 mió. kr. mió. kr. Mælt verður til at lidnar verkætlanirnar verða fíggjaðar av meirinntøkunum fyri 9,7 mió. kr.
Í sambandi við íløgur verður mælt til at játta 2 mió. kr. til Mullers Pakkhús, 1 mió. kr. til spælipláss í miðbýnum og 500.000 t.kr. at býta millum Boðanesheimið, skúlan við Løgmannabreyt og skúlan á Argjahamri.

Í fíggjarætlanini fyri 2015 er roknað við upptøku av lánum á 41,7 mió. kr. umframt at avdráttir á 20,2 mió. kr. verða umfíggjaðir. Mælt verður til at nýta írestandi 1,4 mió. kr. til afturgjald av skuld.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið við hesum broytingum:

8175 Vegir, 1 mió. kr.
5775 Ítróttaranlegg, Felagshús á Argjum 1,3 mió. kr. til liðugtgerð.
5775 Ítróttaranlegg, Hoyvíkshøllin 1 mió.kr. til liðugtgerð av núverandi byggistigi.
5775 Ítróttaranlegg, Baðiland 1 mió. kr.
5110 Tórshavnar Musikskúli, 1 mió. kr.

Fíggja við hesum broytingum:

1,4 mió. kr. afturgjald av skuld
500 t.kr. 7210 Brandstøðin
3,4 mió. kr. keyp og sølu kontan.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 67/15 Framflytingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.03.2015 | 83/15 | 15/01021-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 90/15 | 15/01021-1 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 67/15 | 15/01021-1 |

**Málslýsing**:
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2014 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og løgujáttanir at flyta til 2015. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum. Yvirlitið saman við uppskot til broytingar verður lagt fram saman við roknskapinum fyri 2014.

Í sambandi við viðger av fíggjarætlanini 2015 vóru niðanfyri standandi broytingar samtyktar:

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5370 | Stuðul til íløgur | 2.000.000 | 3212 | Tímar til serligan tørv | 1.600.000 |
| 6811 | Áir og yvirflatuvatn | 400.000 | 3215 | Frítíðartilboð til 3. flokk | 240.000 |
| 1311 | Teknisk fyrisiting | 400.000 | 6275 | Lendisgøtur | 960.000 |
| **Tilsamans** | | **2.800.000** | | | **2.800.000** |

Nýggjur kontobygnaður var samtyktur av býráðnum 26. Feb. 2015 fyri grein *2*. Niðanfyri standandi kontur eru strikaðar:

2713 Sambýlið í Hoydølum
2714 Sambýlið í Kollafirði
2715 Sambýlið í Mattalág
2716 Gjald fyri pláss í øðrum kommunum
2740 Tilhaldið í Tórsgøtu
2741 Dagtilhaldið í Kollafirði
2742 Dagtilhaldið í Nólsoy
2743 Heilræði
2744 Døgurðaskipan hjá pensjónistum
2745 Tiltøk á eldraøkinum

Mælt verður til at flyta samlaðu upphæddina av strikaðu kontounum á tilsamans 256.000 kr. umframt niðanfyri standandi broytingar á grein 2:

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2102 | Sjúkrakassaeftirstøður | 12.000 | 2110 | Aðrar heilsutænastur | 15.000 |
| 2211 | Heilsufrøðiskipan | 114.000 | 2210 | Kommunulæknatænastur | 426.000 |
| 2510 | Serflutningsskipanin | 500.000 | 2610 | Barnaverndarnevndin | 27.000 |
| 2612 | Barnavernd | 1.020.000 | 2611 | Barnaverndarstovan | 112.000 |
| 2615 | Pedagogisk frípláss | 160.000 | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 1.400.000 |
| 2713 | Sambýlið í Hoydølum | -64.000 | 2614 | Barnaverndartænastan (Familjustovan) | 82.000 |
| 2714 | Sambýlið í Kollafirði | -72.000 | | | |
| 2715 | Sambýlið í Mattalág | -66.000 | | | |
| 2716 | Gjald fyri pláss í øðrum kommunum | 29.000 | | | |
| 2740 | Tilhaldið í Tórsgøtu | 110.000 | | | |
| 2741 | Dagtilhaldið í Kollafirði | 13.000 | | | |
| 2742 | Dagtilhaldið í Nólsoy | 177.000 | | | |
| 2743 | Heilræði | 171.000 | | | |
| 2744 | Døgurðaskipan hjá pensjónistum | 96.000 | | | |
| 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | -138.000 | | | |
| **Tilsamans** | | **2.062.000** | | | **2.062.000** |

Á framfluttum løgukarmi fyri Tannrøkt er eitt avlop á 107.000 kr. Verkætlanin er lokað. Mælt verður til at flyta upphæddina til 2775 Eldrarøkt:

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2375 | Tannrøkt | -107.000 | 2775 | Eldrarøkt | 107.000 |
| **Tilsamans** | | **-107.000** | | **Tilsamans** | **107.000** |

Konto 3101 Dagrøktin er strikað, mælt verður til at flyta upphæddina til 3110 Reiðri:

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 3101 | Dagdøktin | 170.000 | 3110 | Reiðrið | 170.000 |
| **Tilsamans** | | **170.000** | | | **170.000** |

Á grein 5 Mentan og frítíð verður mælt til niðanfyristandandi broytingar í sambandi við framflytingina:

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5366 | Stuðul annars | 1.000.000 | 5362 | Stuðul til sjónleik | 477.000 |
| | | | 5363 | Stuðul til tónleik | 317.000 |
| | | | 5364 | Stuðul til mynd- og films | 206.000 |
| | | **1.000.000** | | | **1.000.000** |

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. 4.988 netto, til rakstur og t.kr. 118.199, netto, til íløgur. Umframt at taka undir við omanfyri standandi broytingum.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent við fyrstu viðgerð.

# 68/15 Ársroknskapur 2014 hjá Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.03.2015 | 81/15 | 15/01014-1 |
| 2 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 68/15 | 15/01014-1 |

**Málslýsing**:
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen mæla mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin 2014.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent.

# 69/15 Kvøldskúlin - hølisviðurskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 56/14 | 14/01802-1 |
| 10 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 53/15 | 14/01802-1 |
| 11 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 42/15 | 14/01802-1 |
| 12 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 69/15 | 14/01802-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 70/14 | 14/01802-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 119/14 | 14/01802-1 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 109/14 | 14/01802-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 182/14 | 14/01802-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 213/14 | 14/01802-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 216/14 | 14/01802-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 227/14 | 14/01802-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 54/15 | 14/01802-1 |

**Málslýsing:**
**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

Sigrun Mohr varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Býráðið keypti í mai 2013 ovaru sjónvarpsbygningarnar í Vørðsluni, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a. Ætlan við hesum var at savna størri part av Kvøldskúlavirkseminum har. Í sambandi við keypið varð greitt, at bygningarnir tørvaðu ábøtur.

Kvøldskúlin hevur ynski um at taka partar av bygningunum í nýtslu sum skjótast, og hevur skotið upp, at framflyting av rakstri hjá kvøldskúlanum kr. 1,5 mió verður brúkt til at gera klár høli til tónleik og veving. Hetta vísir seg tó ikki at vera so lætt at fremja.

Arkitektavirki hevur gjørt skitsuppskot til innrætting av bygningunum til kvøldskúla eins og kostnaðarmeting fyri umvælingum v.m. frá oktober 2013, samlað mett til uml. kr. 8,5 mió við øllum. Tekniska fyrisiting tekur stór fyrivarni við hesi kostnaðarmeting m.a. vísandi til, at talan er um renoveringsprojekt, og kostnaðarmetingin tí er uml. 13 mió umframt mvg, ókent og ráðgeving. Til at koma víðari verður mett neyðugt við neyvari prosjekteringsgrundarlagi og heildarætlan viðvíkjandi bygningunum.

Annað ivamál eru útreiðslur í sambandi við brúnna yvir um M.A. Winthersgøtu. Ynski hjá Starvsmannafelagnum er at taka hana niður í summar, men bygningurin hjá Starvsmannafelagnum veitir ognini hjá Tórshavnar kommunu streym. Hetta er ikki vanlig mannagongd, og støða skal tí eisini takast til nýggja streymleiðing.

Harumframt er í frágreiðing staðfestur soppur í bygninginum. Tilráðing frá teknisku fyrisiting er ikki at taka bygningin í brúk til kvøldskúla, fyrr enn soppatrupulleikin er loystur.

Tá so er, er at meta nyttuleyst at brúka 1,5 mió uppá innrættingar júst nú. Heldur eigur arbeiði at vera sett í gongd at útgreina, hvat loysir seg best at gera, hvat skal gerast av funktiónsmessigum ávum, og hvat kostnaðurin verður.

Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið fer at kosta uml. kr. 150.000. Eingin játtan er sett av á íløguætlanini til kvøldskúlan. Mett verður ikki rætt, at kvøldskúlin av rakstri rindar fyri projektfyrireikingar, og tí eigur játtan at verða fingin til vega um íløguætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og tekniski stjóri mæla til at játta kr. 150.000 til:

- At gjørd verður byggitøknilig støðulýsing at fáa greiðu á, hvørjir bygningslutir mugu høvuðsumvælast ella skiftast
- At gjørd verður kravspesifikatión viðvíkjandi nýtslu, hølum o.l. í samstarvi við kvøldskúlan, umframt byggitøknilga kravspesifikatión og myndugleikakrøv
- At gjørd verður umvælingarætlan í stigum, innihaldandi tíðarætlan og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri fígging at seta í verk byggiætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at selja bygningarnar.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, mælir til, at gjørd verður heildarætlan fyri bygningarnar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin 10. apríl 2014 og játta kr. 150.000 av kontu 5210 Tórshavnar-, Ungdóms- og Listaskúla til endamálið, og at nevndin hevur ástaðarfund til komandi fund.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Nevndin var á ástaðarfundi í Kvøldskúlanum. Nevndin heitir á umsitingina um at gera uppskot til stigvísa umvæling og innrætting av hornahúsinum og høvuðsbygninginum, herundir kostnaðarmeting til næsta fund.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til umbyggingar- og umvælingarætlan av hølum og bygningum hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A. Winthers gøtu.

Við støði í nýggjari inniklimafrágreiðing verður mælt til, at drenað verður um húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og um húsini í Vørðsluni 4, umframt at bróta gólvið upp, har sum vesini eru á hædd 1 í Vørðsluni 4. Garðurin millum húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og Vørðsluna 4 skal eftir ætlan takast niður, og viðurskiftini við septiktanga gerast um. Hetta arbeiðið er ætlanin at bjóða út sum undirhondsboð millum tveir veitarar. Soleiðis kann hesin parturin byrja skjótast og verða fyrst avgreiddur.

Tað er ikki ætlanin at gera nakað við bygningin í M.A. Winthers gøtu 5 í hesum umfari, men verður ætlandi partur av øðrum byggistigi seinni.

-o-

Tørvurin hjá kvøldskúlanum at betra um viðurskiftini til veving er stórur. Meiri pláss skal til hetta virksemið, umframt at verandi høli í J. H. Schrøters gøtu 1 (Einars Prent) eftir ætlan skulu brúkast til aðra undirvísing, sum hølini eru betri egnaði til, m.a. til "mál og mentan fyri útlendingar", føroyskt fyri útlendingar og onnur fremmandamál, sum nú húsast í Venjingarskúlanum um kvøldarnar.

Ætlanin er, at veving skal vera í erva í Vørðsluni 4. Í niðaruhædd skal tónleikur halda til (3 smærri tónleikahøli og eitt størri studio til samanspæl). Størra hølið kann eisini brúkast til smærri tónleikartiltøk, kórvenjingar og fyrilestarar. Við hesum hevur kvøldskúlin ikki longur tørv á hølum í Margarinfabrikkini, og sum ætlandi Klippfisk, ið higartil hevur hildið til í M.A. Winthers gøtu 1, fær í staðin. Í niðaru hæddini skal umframt tónleik eisini verða tekøkur og betraði vesiviðurskifti.

Nýggj høvuðsinngongd skal verða til bygningin í Vørðsluni. Høvuðsinngongdin verður flutt at verða úr norðara enda til langsíðuna eystureftir.

Mett verður, at fígging er ikki tøk til at umvæla húsini M.A. Winthers gøtu 1 í hesum byggistigi. Her skal ætlandi glaslist verða í neðra og seymistova í erva.

-o-

Kostnaðarmeting er gjørd fyri omanfyri nevndu arbeiði, innbúgv og útgerð v.m. Útreiðslur til nýggjar útsíður á bygningin til Vørðsluna 4 eru ikki tiknar við í kostnaðarmetingina, men liggur eftir ætlan í einum øðrum byggistigi. Tað sama er við útreiðslunum at gera skitsuuppskot til eina heildarætlan fyri økið.

Ætlanin er at fíggja omanfyri nevndu umvælingar, sum eru at meta sum fyrsta byggistig, av staðfestari minninýtslu í rakstri hjá kvøldskúlanum. Tøk játtan, um øll minninýtslan pr. 31. desember 2014 verður brúkt til endamálið, er kr. 3.352.000. Umvælingarnar eru tó so umfatandi, at tær mugu metast sum ein íløga..

Byggitíðin er mett til 7-8 mðr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á kvøldskúlanum mæla til at samtykkja uppskotið til umbyggingar- og umvælingarætlan, og til endamálið at játta kr. 3.352.000 av rakstrarkontu 5210 Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúli til íløgukontu 5275, Kvøldskúlin.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta pening av rakstrinum til íløgur og mælir til, at umvælingararbeiðið verður boðið út sum aðrar verkætlanir av slíkum slag, og at arbeiðið verður játtað av íløgum.

Jógvan Arge tekur støðu á einum seinni fundi og ynskir frágreiðing um, hvussu hetta avlopið í rakstrinum hjá Kvøld- og ungdómsskúlanum er íkomið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

# 70/15 Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-stýrið (2012-2839)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 14.08.2014 | 176/14 | 14/03424-3 |
| 2 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 70/15 | 14/03424-3 |

**Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-stýrið**
Sbrt. § 4 í kunngerð nr. 49 frá 4. oktober 1965 um góðkenning av viðtøkum hjá interkommunala elektricitetsfelagnum SEV velur umboðsnevndin fyri SEV 7-mannastýri fyri SEV, og fær Tórshavn ein stýrislim. Umboðsmenninir fyri Tórshavn skjóta upp valevni til umboðsnevndina.
Býráðið setur vanliga uppskot fram um, hvørjar býráðið skjýtur upp sum valevni til val av stýrislimi og varalimi.

**Býráðið 29. november 2012:** Skotið verður upp at velja

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Fyri 2013 og 2014: | |
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| | |
| Fyri 2015-2016: | |
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |

**Býráðsfundir 14. august 2014:** Málið útsett.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Fyri 2015-2016 varð skotið upp at velja

| Fastur limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Heðin Mortensen |

Ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

# 71/15 Umsókn um brúksrætt til kommunalt vegaøki burturav matr.nr. ad, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.01.2014 | 21/14 | 14/00242-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 11/15 | 14/00242-8 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 106/15 | 14/00242-8 |
| 4 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 71/15 | 14/00242-8 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
ZETA architect søkja vegna P/F Poul Hansen Heilsøla um brúksrætt til økið fram við bygningunum, á matr nr. 180c, 180d, og180e (Bryggjubakki 4, 6 og 8), ið er vegastrekkið niðan móti Havnar kirkju.

Umtalaða økið er uml. 2,5 m x 18,45 m.

Ætlanin er, hvat útgrevstrinum viðvíkir, at fáa nýggja inngongd frá Bryggjubakka, ið betrar atkomumøguleikar og rýmingarleið frá 1. hædd, samstundis sum hølini á 1. hædd verða ljósari. Í sambandi við útgrevsturin verður m. a. eisini frárensluviðurskiftuni loyst.

**Ætlan:**
Visjónin fyri bygningin hjá Poul Hansen Heilsølu er gjørd ítøkilig í eini ætlan í 4 stigum, ið eisini kundi verið nýtt til aðrar bygningar í Vágsbotni.

Í ætlanir-partinum verða tey 4 stigini: atkoma & opinleiki, fjøltáttað funktións hús, útiøki og livandi vestursíða.

**Leiðingar o. a.:**
Á økinum har útgrevsturin skal verða, liggja bæði SEV-kaðalir, tele-kaðalir, kloakk leiðingar og rottangar. Sí viðhefta yvirlitskort.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í 2. grundumráði í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Skjøl:**
- Støðumynd 1:100, Tvørskurður A-A 1:200, Longdarskurður B-B 1:100, Flatmynd/longdarskurður 1:100, Myndir – j.nr.: 2013-2713/1.
- Bentley yvirlitskort.
- Viðmerkingar

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og løgdeildin mæla til, at fíggjarnevndin tekur støðu til, og avgreiðir málið um nýtslurætt til kommunala vegaøkið oman fyri bygningin, sambært umsóknini, og at beina málið í teknisku nevnd at viðgera og avgreiða teknisk viðurskifti og ferðsluviðurskifti í samband við ætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur ikki verið til viðgerðar í ferðslunevndini enn. Men á fundinum 18.12.2013 verða spurningar um einvegis ferðslu á økinum umrøddir og hvønn veg ferðslan ætlandi skal koyra. Spurningurin um atkomu fyri jarðarferum skal eisini viðgerast eins og støðan við færri p-plássum skal viðgerast.

Í sambandi við møguligt anlegsarbeiði, skulu eisini atlit verða tikin til um talan verður um at umleggja verandi leiðingar í vegkassanum. Tað fyriliggur í løtuni eingin kostnaðarmeting av hesum arbeiði.

**Tekniska nevnd 9. desember 2013:** Málið umrøtt og verður tikið upp aftur á seinni fundi.
Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ferðslunevndin 18. desember 2013:** Nevndin metir, at einki er til hindurs fyri at ganga umsóknini á møti, treytað av at til- og frákoyringarviðurskiftini verða á sama støði sum í dag. Ynski er at fáa útgreinað nærri, hvussu girðing millum komandi farbreyt og uppihaldsøki hjá umsøkjaranum fara at verða gjørd. Nevndin ynskir at viðgera málið, tá fullfíggjað prosjekt fyriliggur.
Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umboð fyri umsøkjaran kemur á fundin at greiða frá.

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndini 13. nov. 2013 um at játta brúksrætt, treytað av at ferðsluviðurskiftini verða nærri lýst og loyst sambært samtykt í ferðslunevndini 18. des. 2013. Viðv. tekniskum leiðingum í økinum, samtykti nevndin, at umsøkjarin í samráð við umsitingina ger eina ætlan fyri neyðugar flytingar av leiðingum, og at umsøkjarin rindar fyri slíkar flytingar. Eisini verður sett sum treyt, at vegalinjan móti kirkjugarðinum verður óbroytt.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta brúksrætt við teimum treytum, sum tekniska nevnd hevur samtykt.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hoyringsskriv er sent Fornminnissavninum og grannunum, sum eru Havnar kirkja, Sp/f Bryggjubakki nr. 2 og Reyði krossur. Harumframt hevur málið verið til viðmerkingar hjá sløkkiliðsstjóra, Kartna Jacobsen, leiðaranum á brennistøðini, Bárða Michelsen og til viðgerðar í serstaka byggiráðnum fyri Reyn (SBR).

Hesar viðmerkingar eru komin inn:

<u>1. Tórálvur Weihe – søvn landsins</u>

*Vísta trappan vil forða fyri, at gongubreyt verður gjørd fram við facadunum á Bryggjubakka.*

*Samstundis kann hetta gerðast eitt ónossligt stað (pissirenna og annan ólevnað).*

*Fyri húsini á Bryggjubakka og virksemið í húsunum vildi verið rættast at frílagt facadurnar aftur við at taka burtur parkeringsplássini, sum eru kroyst inn móti facadunum. Hetta vildi gjørt økið nógv attraktivari.*

*Valda neyðtrappuloysnin frá 1. hædd undrar. Tað átti at borið til at havt neyðtrappu inni í húsinum, annaðhvørt niður á terreng undir Bryggjubakka ella upp til Bryggjubakka (t.d. til ein dur, sum er brandmessiga atskildur frá høvuðstrappuni).*

*Um hildið verður, at ein tílík neyðtrappa inni í húsinum tekur ov nógv pláss, kundi ein heldur lagt nøkur hjárúm undir vegnum, og fingið plássið innaftur á henda hátt, heldur enn at gera trappu uttandura.*

*Eisini kundi ein umhugsa, um ein kundi sligið seg saman við grannahúsinum (sum kanska hava sama trupuleika at tryggja fluktvegir), og so gjørt neyðdyr millum ymsu grannahúsini.*

*Fyri at kunna meta um umsóknina, eigur í øllum førum samlaði innrættingurin fyri bygningin at vera vístur.*

<u>2. Sløkkiliðsstjórin</u>
*Vegurin skal verða minst 3 m breiður, serliga í mun til tey amboð í sløkkiliðið nýtir, KBB 6.2.-3.*

<u>3. Leiðarin á brennistøðini</u>
*Sum er, er trongt hjá lastbilum at sleppa framvið og blívur tað smalri, umframt at hornið stendur so langt út, verður tað nærum ógjørligt at venda rundan um.*

<u>4. Serstaka byggiráðið fyri Reyn</u>
*Serstaka Byggiráðið fyri Reyn tekur fult undir við viðmerkingum Fornminnissavnsins og mælir annars staðiliga frá at geva byggiloyvi.*

**Tilmæli:**
Vísandi til at serstaka byggiráðið fyri Reyn og Fornminnissavnið hava mælt frá at geva loyvi til at gera trappu út í verandi vegøki, mælir tekniski stjórin til at loyva eini útbygging, har dekk verður lagt omaná, soleiðis at vegurin, Bryggjubakki, verður óbroyttur og ikki at loyva bygging av trappu út á vegøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Løgdeildin hevur gjørt uppskot til ein 25 ára leigusáttmála um leigu av undirlendinum undir vegnum, sí skjal nr. 14/00242-44

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at góðkenna uppskotið til 25 ára leigusáttmála, sí skjal nr. 14/00242-44

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 72/15 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |
| 4 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 3/15 | 14/00896-7 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2015 | 4/15 | 14/00896-7 |
| 6 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 24/15 | 14/00896-7 |
| 7 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 18/15 | 14/00896-7 |
| 8 Vinnunevndin | 20.04.2015 | 11/15 | 14/00896-7 |
| 9 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 72/15 | 14/00896-7 |

## Málslýsing:

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann størsta partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi. Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.
- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina
- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.
- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.
Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.
Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.

Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.

Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**

**Støðulýsing**

**Árinskanningin,** hevur verið til hoyring. Viðmerkingar til hoyringsskrivini verða í løtuni viðgjørd. Tá viðgerðin er liðug, verður hon løgd fyri býráðið, og eftirfylgjandi send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Modelroyndin,** sum vísir hvussu grótkastið skal uppbyggjast er liðug.

**Byggiprogrammið** er gjørt.

Um arbeiðið skal kunna bjóðast út í 2015, má projekteringin byrja nú. Uppskot til avtalu um projektering er gjørt við LBF, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja uppskot til byggiprogram.

Eisini verður mælt til at játta 6 mió. kr. til projektering og forkanningar.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 20. januar 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at samtykkja, at aðrir møguleikar fyri víðkaðari góðshavn í kommununi verða gjølla kannaðir við atliti at kostnaði og umstøðum annars, áðrenn byggiskrá verður samtykt og peningur játtaður til at projektera

ætlaðu útbygginina av Skansabryggjuni og Eystara havnarøki í Havn. Víst verður til framløgd skitsuuppskot d.d. um havnarbygging á Sundi.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Árinskanningin lá frammi til hoyringar í tíðarskeiðinum frá 26. juni til 19. september 2014, og inn komu 7 hoyringsskriv.
Ein samlað viðmerking til hoyringsskrivini er gjørd í ”hvidbog”, sum saman við árinskanningini verður send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við viðmerkingunum í ”hvidbog” og at senda hesar til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Vinnunevndin 20. april 2015:** Ein meiriluti **:** Sjúrður Olsen, tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekksteintekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til minnilutatilmælið frá vinnunevndini 20. januar 2015.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við vinnunevndini og at senda málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn málið verður sent Umhvørvisstovuni, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

# 73/15 Nýggj spælipláss til børn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 23/14 | 14/01046-4 |
| 10 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 25/15 | 14/01046-4 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 100/15 | 14/01046-4 |
| 12 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 91/15 | 14/01046-4 |
| 13 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 73/15 | 14/01046-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 197/14 | 14/01046-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 186/14 | 14/01046-4 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 231/14 | 14/01046-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 55/14 | 14/01046-4 |
| 6 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 329/14 | 14/01046-4 |
| 7 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 2/15 | 14/01046-4 |
| 8 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 240/14 | 14/01046-4 |
| 9 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 5/15 | 14/01046-4 |

**Málslýsing:**
**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at heita á teknisku nevnd um at fyrireika 4 nýggj spælipláss til børn í Tórshavn.

**Ískoyti:**
9. juli 2012 teldupostur frá Innspark við tilboð um at veita smá spælipláss at seta saman við útifimi-tólunum á Glaðsheyggi, í Viðarlundini í Grið og í Nólsoy.

Tilboðini fevna um fýra ymisk tól miðalprísur er 116.330 kr/stk. við mvg, tilrigging, útgraving og planering. Serligt fallundirlag er ikki við í prísinum.

Um hesi spælipláss skula raðfestast í verandi fíggjarári 2013, krevur tað umraðfesting av ætlaðum arbeiðum á rakstrarkonto 6210.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til eitt spælipláss í Grasagarði fyri kr. 300 – 400 túsund av konto 6210.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Mentamálanevndin heitir enn einaferð á teknisku nevnd um at fyrireika spælipláss til børn í Tórshavn og at miðjað verður eftir, at tey verða klár at taka í nýtslu í summar.

- Forkvinnan ynskir umrøtt, hvussu spælipláss í miðbýnum kunnu verða skipað í mun til námsfrøðiliga, tað estetiska og undirhaldsvirðið í spæliplásspolitikkinum og møguleikan, at spæliplássini eru mannaði á onkran hátt við fólki við førleikum.

**Ískoyti:**
Vísandi til fleiri áheitanir og til ítøkiliga umsókn frá 2008 um at skipa eitt spælipláss í miðbýnum, verður við hesum sent nevndum til viðgerðar, at skipa eitt størri spælipláss í miðbýnum.

Eitt spæliplláss við dagligari fastari manning. Eitt pláss undir eftirliti, ið kann læsast um náttina.

Málið hevur verið frammi á býarskipanardeildini, og okkurt uppskot um skipan er komið uttanífrá, sum tó ikki verður mett egna í verandi líki.

Býarskipanardeildin er biðin um at fáa til vega uppskot at bjóða út og avsettar eru 850.000 kr. á íløgum FÆ2014, til Spælipláss í miðbýnum.

Grasagarður millum Steinatún og Kongagøtu verður mett áhugavert øki mitt í býnum. Uml. 2.200 m² til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335,337,338. Á matriklunum eru skúlatannlæknastovan og “Tilhaldið” . Savningarstaður hjá teimum eldru í býnum. Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar, við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum. Seinnu árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar, grótgarðar lækkaðir, og verður økið nú nýtt til uppihald, gjøgnumgongd og ymisk tiltøk, barnafagnað, brúðarvígslu, topp-popp konsertir Hátíðarhald fyri pisum á Føroya Handilsskúla, er vorðið ein fastur árligur táttur í juni. Umframt at økið verður brúkt til ótálmaðan drykkjuskap, graffiti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir.

Á økinum eru stór gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur, staudir og grasvøllir. Í miðbýnum er av bestu vakstarmøguleikum og hartil veðurgott.

Størstu amparnir eru larmur frá ferðsluni í Steinatúni, manglandi drening av grasvøllunum og ólevnaður.

Býarskipanardeildin mælir til at staðseta spælipl ássið “GRASAGARÐUR” á nevndu matriklar, at byggja umsitingarhús við WC, skipa økið til spæl, ísbreyt um veturin, ítriv og uppihald. At økið er mannað við fakfólki, pedagogum og serfrøðingum innan motorikk hjá børnum. At økið verður girt inni og upplatingartíðirnar eru 07.00 - 22.00 á sumri og 10.00 – 20.00 á vetri. At játta kr. 850.000 kr. av FÆ2014 til projektering, drening, aðra fyrireiking og serkøna hjálp.

Harumframt verður mælt til at raðfesta fasta upphædd á fíggjarætlan komandi árini til rakstur og viðlíkahald kr. 400.000 av hesum nýggja rakstrarstaðnum, og 500.000 kr. árliga í nøkru ár til framhaldandi útbygging.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mælir nevndini til at samtykkja omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at staðseta spæliplássið “GRASAGARÐUR” á nevndu matriklar, at gera uppskot um bygging av umsitingarhúsi við WC, skipa økið til spæl, ítriv og uppihald at leggja fyri nevndina aftur, og at játta kr. 850.000 av FÆ2014 til projektering, drening og aðra fyrireiking. Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar nevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyri standandi samtyktir, so hava fundir verið innanhýsis um, at skipa økið til spæl og ítriv hjá børnum út frá teimum nýggjastu pedagokisku prinsippunum, ið stuðla undir

menning og motorikk hjá børnum. Ì hesum hevur deildin leita sær ráð hjá serfrøðingum á deildini børn og ung. Ásannandi tað, at lata børnini spæla sjálvi í frið í tryggum og mennandi umhvørvi, og at tey vaksnu blanda seg sum minst uppí. Á tann hátt lata sansirnar kveikjast og vekjast og motorikkin mennast.

Nakað av forarbeiði er gjørt, t.d. økið er býtt upp í partar hvørt við sínum eyðkennum, fyrimunum og vansum.

Fyri at skipa økini til spæl, sum omanfyri er ætlað, er neyðugt við umfatandi drenings- og lendisarbeiði.

Nú er vend at vera komin í, og ynski er um at gera eitt «klassiskt» spæliøki við spælitólum.

Eitt uppskot er komið inn frá veitaranum sp/f INNSPARK, áljóðandi umleið 1 mill. kr. Mett verður at arbeiðið eigur at bjóðast út til fleiri veitarar, tá tað kemur hartil.

Víst verður til júst samtykta innkeyps- og útboðspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu, «Yvirskipaða endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum er, at peningur skattgjaldarans verður nýttur so effektivt sum gjørligt, og at innkeyp og útboð í Tórshavnar Kommunu fer fram eftir meginreglum, sum tryggja effektivitet, gjøgnumskygni og eins viðferð av veitarum.»

Fyri at kunna skipa nøkur øki er neyðugt at vita meira ítøkiliga hvør málsetningurin er,
Og undir hesum at vita um:

1. Skal økið fevna um allan tann gamla urtagarðin, ella bert ein part. Valt verður at fevna um tvey øki, báðar verandi grasplenurnar
2. Skal pavilliongin takast niðu? Nei, tí hon kann helst brúkast at festa klatrinet á.
3. Skal trappa gerast uppá Kongagøtu. Nei, tí ætlanin við kommunuskúlanum er ikki greið enn.
4. Skal økið samskipast við framtíðar virksemi í kommunuskúlanum. Nei, tað verður at bíða til seinni, sí omanfyri
5. Skula gøturnar festast.. asfalt ella flísar. Ja, asfalt er helst tað ódýrasta.

Bindingar eru:

- Serstaka byggisamtyktin nr. 12 um at økið B. Skal skipast sum almennur urtagarður. Spurningur um samstyktin skal broytast. Mett verður at garðurin framvegis kann metast sum ein «urtagarður».
- Miðbýarætlanin og tann ætlaða skipanin av ferðsluni í økinum. Kemur at ávirka ferðslumynstrið nakað. Verður lagað til tað, tá tað er greitt.
- Drening av øki, vatntrupulleikar at loysa, tí nógv vatn rennur oman gjøgnum garðin, tá tað regnar.
- Burturgrevstur av verandi tilfari, mold v.m. og tilkoyring av nýggjum stabilum tilfari.
- Stóru trøini skugga nógv um summari, har má skerast niður og tað skal vera við skili.
- Logistikkur tá arbeitt verður, Kongagøta ella Steinatún, kranar, lastbilar, sperring av ferðslu, skúlagarðurin í Kongagøtu, v.m.
- Játtanin er bert 850.000 kr.

<u>Uppskot til leist:</u>

- Valt er at grava moldina burtur av verandi grasplenum, uml. 400 m$^2$ byggja tær uppaftur við stabilum tilfari og sandi uml. 250.000 kr.

- Drening av økinum og legging av brunnum og rørum uml. 100 m og 5 brunnar 100.000 kr.
- At bjóða veiting av spælitólum út til tveir veitarar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka undir við uppskotinum og at beina málið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til býráðið, og at játta 850.000 kr. av fíggjarkarminum til spælipláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt við teiri viðmerking, at bjóða út til fleiri veitarar.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Nevndin ynskir at beina málið í mentamálanevndina, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd, vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 10. apríl 2013.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
- Samtykt er at skipa grasplenurnar í Grasagarði til spæliøki hjá børnum. Valt er at grava flag og  mold av teimum stóru grasplenunum, drena og byggja tær uppaftur við stabilum tilfari. Skráar á grasplenu skulu skipast við timbursititrappu.
- At skipa hesi bæði økini við spæliútgerð og góðum fallundirlag. Verkætlanin fevnir um jørð- og timburarbeiði, dren- og vatnavveiting, útvegan og uppseting av ljósútgerð og útvegan og uppseting av spæliútgerð, klatrinet, trampolinir v.m. og fallundirlag.
- Økið liggur mitt í býnum og verður brúkt til gjøgnumgongd.
- Valt er at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøka/heildarútbjóðing.
- Samtykta ætlanin er broytt nakað. Fallundirlagið skal vera gummifallundirlag, av somu dygd sum er lagt í nógvum barnagørðum. Umframt at skráar og hæddarmunir skulu gerast sum timbursititrappur. Trin, h 30 x b 60 cm.

| | |
|---|---|
| • Kostnaður tilsamans | 1.420.000 |
| • 6,25% mvg | 88.750 |
| • Mett fíggjarlig binding tilsamans | 1.508.750 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku/totalentreprisu sum undirhondsboð. Fíggjað við 850.000 kr. av løgukarminum til spælipláss, og at søkt verður um írestandi kr. 658.750 av løgukarminum konto 6275, Fríðkan av býnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býáðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 74/15 Møguligt samstarv við IRF um viðgerð og burturbeining av rottangaevju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 83/14 | 14/01625-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 104/14 | 14/01625-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 98/14 | 14/01625-1 |
| 4 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 186/14 | 14/01625-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.04.2015 | 27/15 | 14/01625-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 97/15 | 14/01625-1 |
| 7 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 74/15 | 14/01625-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Fyrispurningur er komin til TK/KB frá IRF, um at ganga saman um at finna loysnir til viðgerð og burturbeining av rottangaevju. IRF skrivar, at tey eru í ferð við at leita eftir og kanna meiri haldgóðum loysnum til viðgerð og burturbeining av rottangaevju, enn tær ið nýttar verða í dag, og heitir á TK/KB um at vera við at kanna, um tað fíggjarliga og í aðrar mátar loysir seg best at byggja og reka eitt ella fleiri anlegg og at kjølfesta loysnirnar í felag ella hvørt felag sær, og hvar slíkar loysnir mest høgliga kunnu leggjast. IRF hevur leysliga kanna onkra alternativa viðgerðarskipan.
Víst verður til skriv frá IRF, j.nr. 14/0625-5.

Stjórin í IRF, Poul Andrias Joensen, er til reiðar at koma á fund í teknisku nevnd, at greiða nærri frá fyrispurninginum.

Sum støðan er í løtuni, er átroðkandi at fáa ein loysn á spurninginum um nýtt rottangapláss, í staðin fyri verandi rottangapláss í Húsahaga.
Nýtt rottangapláss, ið byggir á somu viðgerð av evjuni við kálkstabilisering, men við goymslutangum, er nærum liðugt projekterað, men eingin loysn er í eygsjón viðvíkjandi staðsetingini.

Umboð fyri KB og formansskapurin í teknisku nevnd, hava á arbeiðsferð í DK saman við IRF verið og hugt eftir tílíkum annleggi, sum IRF vísir á, og verið á óformligum kunningarfundi við umboð fyri Krüger, ið hevur bygt annleggið.

At síggja til tykist hendan tøknin rættiliga áhugaverd og vælegnað til føroysk viðurskifti. Eyðsýndir fyrimunir eru í, at skipanin er lokað og luktur er nærum eingin. Sambært teimum upplýsingum, ið eru fingnir til vega higartil, er kostnaðurin á einum rættiliga rímiligum støði, helst lægri enn tann loysnin við goymslutangum, sum arbeitt hevur verið við higartil.

Áðrenn umsitingin kann arbeiða áfram at kanna møguleikarnar fyri eini slíkari loysn saman við IRF, er neyðugt at fáa heimild og fígging til tess. Í fyrsta umfari má heimild og fígging fáast til at gera skitsuprojekt saman við IRF, sum skal vera grundarlagið undir eini støðutakan til, um eitt tílíkt annlegg skal byggjast. Kannast og lýsast skal m.a.:

1. Hvat ið "endaliga produktið" er og kann vera, og hvussu sleppast kann av við hetta
2. Hvørjar teknisku loysnir eru bestar til at koma fram til "endaliga produktið"
3. Hvørjir eru møguleikarnir og hvørjar eru treytirnar fyri at viðgera og "sleppa av við" tí frásoldaða tilfarinum, við vætufrárensl, við eftirverandi evjuna (endaliga "produktið") ella við øsku frá møguligari brenning av evjuni.

4. hvørt tað loysir seg best fíggjarliga og rakstrarliga fyri partarnar at byggja eitt felags annlegg, ella um partur av annlegginum skal vera felags og aðrir partar hvør sær, ella um talan skal vera um hvør sítt annlegg.
5. Tekniskar/rakstrarligar treytir fyri staðseting av annleggi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

- At umsitingin fær heimild at gera skitsuprojekt og kanningar annars, til tess at lýsa grundarlagið undir eini tilíkari loysn.
- At játtaðar verða 426.000 kr. av framfluttari løgujáttan á konto 7175-L71001til kanningar og projektering.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti (februar 2015):**

Tórshavnar kommuna hevur fingið eina framløgu av einum skitsuprojekti, sum IRF hevur gjørt av umrøddu skipan (framløgan hevur j.nr. 14/01625-13). Umsitingin hjá TK hevur ikki beinleiðis verið við at gera skitsuætlanina, tí IRF fór í gongd við arbeiðið beinanvegin, áðrenn umsitingin hjá TK hevði fingið heimildina til projektering uppá pláss, men IRF hevur kunnað umsitingina hjá TK um arbeiðið so hvørt.

Umsitingin hevur, við støði í fyriliggjandi skitsuprojekti og erfaringstølum annars, gjørt metingar av hvat ið kostnaðurin fyri TK kann væntast at verða at viðgera rottangaevjuna, um talan gerst um eitthvørt samstarv við IRF um eina slíka skipan, sí talvu 1 niðanfyri. Fyrivarni verður tikið fyri, at íløgu- og rakstrarkostnaðurin bert eru mettur útfrá fyriliggjandi tilfari.

**Talva 1: Yvirlit yvir íløgur og rakstur**

| | Íløga Mió kr. | Avskriv-ingartíð (ár) | Kapitalkostn. íløga (við 4 % p.a.) Mió kr. pr. ár |
|---|---|---|---|
| **Íløga pr annlegg:** | | | |
| -Bygningur | 20 | 20 | 1,47 |
| -Maskinur | 15 | 15 | 1,35 |
| **Íløga Í alt** | **35** | | **2,82** |
| | | | |
| **Rakstur** | | | |
| -Annlegg (felags): | | | 1,73 |
| -Flutningur av evju úr TK til Hagaleiti og aftur (Bert TK) | | | 0,48 |

Um talan gerst um eitthvørt samstarv, koma partarnir at deilast um kostnaðin til íløguna og rakstur av annlegginum eftir einhvørjum lutfalli, sum samráðast skal um.

**Samstarvshættir**
Samstarvið kann skipast á ymiskan hátt, t.d.:

I. Annar parturin fremur íløguna og rekur annleggið, meðan hin parturin viðger evjuna á annlegginum (sum keyp av tænastu). Um IRF fremur íløguna og stendur fyri rakstrinum, meðan TK bindur seg til at viðgera sína evju á annlegginum (sum keyp av tænastu), skal TK ikki sjálvt gera íløgu í nýtt rottangapláss. Eftir hesum modellinum verður økti rakstrarkostnaðurin hjá TK umleið 2,1 til 2,5 mió. um árið. Hetta er helst einklasti hátturin at skipa samstarvið uppá, og kann skipast í sáttmála yvir 10-20 ár.

II. Báðir partar fremja íløguna, meðan annar parturin rekur annleggið. Báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Um IRF stendur fyri rakstrinum, og TK bindur seg til at viðgera sína evju á annlegginum (sum keyp av tænastu), verður neyðugt hjá TK við eini íløgu á umleið 17,5 mió. og øktum rakstrarútreiðslum á umleið 1-1,2 mió. um árið. Samstarvið verður eitt sindur truplari at skipað enn I, av tí at talan gerst um felags ognarskap av einum annleggi, og má tí skipast í langtíðarsáttmála.

III. Báðir partar standa fyri íløguni og reka annleggið í felag, og báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Hesin hátturin gerst helst torførari at fremja enn I og II, av tí at talan gerst bæði um felags ognarskap og rakstur av annlegginum (herundir starvsfólk), og skal samstarvið tí skipast í langtíðarsáttmála

IV. Báðir partar stovna eitt nýtt interkommunalt felag ella eitt partafelag, sum stendur fyri íløguni og at reka annleggið. Báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Hesin háttur kann gerast kostnaðarmiklari, tí eitt nýtt felag viðførir eyka útreiðslur til m.a. umsiting.

**Uppskot til loysnir**
Í talvu 2 eru ymsu uppskotini til loysnir settar upp yvirskipað. Viðmerkingar til ymsu loysnirnar eru undir talvuni.

**Talva 2: Yvirlit yvir uppskot loysnir í mun til verandi skipan**

| | Samstarv við IRF | TK loysnir (ikki samstarv við IRF) | | |
|---|---|---|---|---|
| Loysn | **A**<br>IRF-uppskot | **B**<br>IRF-uppskot | **C**<br>Rottangapláss/<br>Móttøkutangar | **D**<br>Verandi loysn |
| Staðseting: | Leirvík/Hagaleiti | Tórshavn (á Hjalla) | ?? | Húsahagi |
| Íløga (Mió kr.) | 0 (I)<br>17,5 (II) | 35 | 15 | - |
| Øking í rakstrarútr. mió pr.ár | 2,1 - 2,5 (I)<br>1,0 - 1,2 (II) | 1,0 | 0,5 | - |
| Viðgerðarháttur | Polymer/skrúvupressa<br>Bandpressa<br>Turking við hita | Polymer/skrúvupressa<br>Bandpressa<br>Turking við hita | Kálk<br>Turking við vanligum luftskifti | Kálk |
| Viðgerð av Endaprodukt: | Brenning /<br>jørðáskot | Brenning /<br>jørðáskot | Jørðáskot | Jørðáskot |

**Viðv.: A**

Loysn A er uppskotið, sum IRF hevur arbeitt við, og sum IRF ætlar at byggja og staðseta niðanfyri Brennistøðina á Hagaleiti í Leirvík. Romartalið í parantes sipar til fyrr umrødda samstarvshátt.

Á Hagaleiti kann tøk avlopsorka frá Brennistøðini gagnnýtast til turking av evjuni. Hetta uppskotið er væl meiri framkomin enn loysn C, sum er nýtt rottangapláss, sum TK áður partvíst hevur projekterað. IRF-uppskotið er í høvuðsheitum ein skipan, har evjan fyrst verður turkað í eini skrúvupressu, og síðani turkað enn meira við einum bandturkara, har ið avlopshiti frá Brennistøðini verður nýttur. At enda verður lidna produktið latið í sekkir. Fyrimunir við hesi skipan eru serliga, at skipanin er lokað og harvið meiri arbeiðsumhvørvis-vinarlig, og at evjan verður turkað so mikið nógv, at til ber at brenna hana og harvið kann evjan burturbeinast endaliga á ein tryggan hátt.

**Viðv.: B**

Loysnin er sama tekniska loysn sum A, men framd av og staðsett í Tórshavnar kommunu. Loysnin krevur nógva hitaorku og einastu hugsandi hitakeldur eru Brennistøðin á Hjalla ella olja, sum er dýr og dálkandi ($CO_2$ útlát). Avlopsorkan frá Brennistøðini er tó í sáttmála latin til Fjarihitafelagið (FHF), sum brúkar stóran part av orkuni, serliga um veturin, og tískil er ikki nóg mikið av orku tøk til hesa loysn í verandi støðu. Væntandi fer orkutørvurin hjá FHF at økjast komandi árini. Skal orka fáast frá Brennistøðini, má sáttmálin við FHF broytast fyrst, so at orkan kann nýtast til hetta endamálið, men so kann orka koma at mangla í til Fjarhitaskipanina.

Skal orkan frá Brennistøðini nýtast, má annleggið staðsetast beint við síðuna av Brennistøðini, t.v.s. á einum av ídnaðarøkjunum yvirav Brennistøðini, sum eru privat ogn. Hesar ognir mugu tískil keypast ella ognartakast frá eigarunum.

**Viðv.: C**

Loysn C er ein víðarimenning av verandi rottangaskipan, sum í dag verður nýtt í Húsahaga. Evjan verður eins í Húsahaga viðgjørd/stabiliserað við kálki, men í mun til verandi skipan, har ið kálkviðgjørda evjan liggur undir opnum himli, verður kálkviðgjørda evjan flutt í goymslutangar at turka.

Hendan loysnin krevur, at hóskandi byggilendi verður funnið. Krøvini til lendi eru m.a. hesi:

- Vídd: umleið 80 m * 80 m = 6400 $m^2$, helst rímiliga slætt
- Er flokkað í umhvørvisflokk 7 og skal tí liggja minst 500 m frá bústaðarøki. Helst verður eisini neyðugt við hóskandi frástøðu frá øðrum virksemi, har ið fólk arbeiðs ella savnast.
- Økið skal liggja í kloakkeraðum øki, har ið kloakkin verður leidd á streymasjógv.
- Økið skal hava vegatgongd til tunga ferðslu
- Økið skal ikki liggja ov høgt, vegna vanda fyri kava og hálku.

Um IRF byggir eina loysn sum A, so er tað rættiliga ivasamt, um tað verður gjørligt hjá TK at fremja og nýta loysn C, vísandi til, at loysn A er væl meiri framkomin tekniskt, arbeiðs-umhvørvisliga og umhvørvisliga, og harumframt loysir trupulleikan við endaliga produktinum betri. Krøv frá myndugleikum (umhvørvismyndugleikum og arbeiðseftirliti) um at nýta best tøku tøkni (BAT), umframt møguligur mótvilji frá starvsfólki at arbeiða við eini verri skipan enn tann hjá IRF, kann forða fyri, at loysnin kann fremjast.

**Viðv.: D**

Loysn D er verandi skipan á rottangaplássinum í Húsahaga. Sum áður er víst á, er loysnin ikki hóskandi ella brúkilig longur (mál 14/00625). Trupulleikarnir eru serliga hesir:

- Ivasamt eru, hvussu effektiv hygiejniseringin við kálkviðgerðini er, tá ið evjan liggur undir opnum himli og kálkið regnar burtur aftur eftir fáum døgum
- at evjan fæst ikki nóg turr, so hon kann útleggjast sum jørðáskot.
- Ógjørligt at leggja evjuna í hóskandi atskildar goymslur og harvið halda evjuna atskilda eftir aldri, so hon kann leggjast út aftur eftir túri
- Arbeiðsumhvørvi er ikki nóg gott (tungar byrður, vandi at fáa esjandi kálk á seg, sera óhumskar umstøður, ið kunnu sleppast undan við aðrari tøkni

Ein onnur týðandi orsøk til at onnur loysn, enn verandi loysn við rottangaplássi í Húsahaga, má finnast, er at verður rottangaplássið flutt, so kann plássið nýtast til tyrvingarøkið, sum er harðliga tiltrongt.

**Kostnaður pr. borgara**

Í Talvu 3 niðanfyri er núverandi og framtíðar kostnaðurin at reka tangatømingarøkið vístur í krónum fyri hvønn borgara, um farið verður undir samtarv við IRF um nevndu loysn.

Undir verandi kostnað er ikki roknað við gjørdum íløgum í føst annlegg (rottangapláss, kálkblandari, bygningar/garagur, vaskipláss), men gjørdar íløgur í rottangabilar og slamsúgvara eru við.

**Talva 3: Kostnaður av tangatømingarskipan (kr. pr. borgara pr. ár)**

| Verandi kostnaður | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 200 | 164 | 217 | 197 | 195 | |
| Íløgur í bilar | 51 | 51 | 51 | 51 | 51 | |
| Bruttoútreiðslur í alt | 251 | 215 | 268 | 248 | 246 | |
| Inntøkur | -34 | -30 | -32 | -33 | -32 | |
| Nettokostnaður | 216 | 185 | 236 | 215 | **213** | |
| | | | | | | |
| **Framtíðar kostnaður** | | | | | Samstarvsháttur I | Samstarvs háttur II |
| Nýggj útr. viðgerð (samst.háttur I / II) | | | | | 125 | 60 |
| **Kostnaður í alt** | | | | | **338** | **273** |

**Samanumtikið:**

Vísandi til:

- At neyðug hitaorka ikki er tøk til loysn B og at øki á Hjalla ikki er tøkt.
- At útlit eru fyri, at IRF byggir eina meiri framkomna loysn A, sum ger tað torført at verja loysn C
- At loysn D ikki er hóskandi ella brúkilig longur og at bráðfeingis tørvur er á plássinum í Húsahaga til tyrving.

Metir umsitingin, at skilabesta loysnin í verandi støðu er at fara í samstarv við IRF um loysn A.

Umsitingin hjá IRF ætlar at leggja málið fyri politisku leiðsluna hjá IRF (nevnd/aðalfund) í vár til politiska støðutakan. Í hesum sambandi er tað er umráðandi hjá IRF at vita, um Tórshavnar kommuna verður partur av ætlanini, soleiðis at annleggið kann fyrireikast til nøgdirnar hjá Tórshavnar kommunu eisini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

1. at Tórshavnar kommuna tekur prinsipiella avgerð um at samstarva við IRF um loysn A (samstarv við IRF um IRF-uppskot á Hagaleiti).
2. at arbeitt verður víðari við at skipa sjálvt samstarvið við IRF sambært uppskot I (IRF stendur fyri íløgu og rakstri), alternativt sambært uppskot II (at báðir partar fremja íløguna, meðan IRF stendur fyri rakstrinum). Herundir eisini at gera uppskot til eina fyribils samstarvsavtalu um tilgongdina fram til at endaligur samstarvssáttmáli kann gerast.
3. at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina, og at støðutakanin hjá TK verður fráboðað IRF.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvis-nevndini og fíggjarnevndini.

# 75/15 Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 42/15 | 14/02182-8 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 99/15 | 14/02182-8 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 75/15 | 14/02182-8 |

**Málslýsing: (sí eisini mál nr. 2011-2060 og 2000-1640)**
Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 6. september 2011, vísir Tummas Justinussen á, at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós, og at íbindingin til Marknagilsvegin er óskipað. Ynski er, at Dalalíð verður gjørd liðug.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Tummas Justinussen hevur aftur gjørt vart við at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós og ynskir at fáa dagført vegin nú. Umsitingin hevur svarað í skrivi til Tummas O. Justinussen, at farið verður ikki undir arbeiðið at dagføra vegin fyrr enn fígging fyriliggur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig kostnaðarmeting av eini dagføring av Dalalíð. Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting álj. uml. 0,7 mió. kr. sambært skjali nr. 14/02182-10 og 14/02182-11.

Umsitingin greiðir frá.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Nevndin samtykti, at farast skal undir at gera arbeiðið, fíggjað av kt. 8175, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

## 76/15 Matr. nr. 1365 cz, Tórshavn. Eigarin av ognini søkir um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 100/15 | 14/04959-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 14/04959-5 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 76/15 | 14/04959-5 |

**Málslýsing**:
Eigarin søkir um loyvi til at selja ognina matr. nr. 1365ci, Tórshavn.

**Frágreiðing.**
Í sambandi við útstykkingina við Villingardalsvegin í 1981, varð avtalað gjørd við táverandi leigara av leigutrøðni sum kom at vera partur av útstykkingini, at eitt av børnum hansara skuldi hava møguleika til at eitt keypa eitt grundstykki á trøðni, um henda kom undir útstykking. Keypsprísur 28 kr.m2, umframt byggibúning og aðrar útstykkingarútreiðslur.

Í 1987, verður endaligt skeyti skrivað uppá matr. nr. 1365ci, og tinglýst til núverandi eigara.

Talan er um vanligt skeyti til kommunalar treytir, herundir 2 ára byggiskyldu frá tí at skeytið er tinglýst. Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrrenn sethús eru bygd á stykkinum.

Víst verður annars til fundarfrágreiðing í málinum.

Løgdeildin hevur havt samráðingar við eigaran, sum er sinnaður til at handa kommununi grundstykkið aftur um hann fær endurrindað tær útreiðslur sum hann hevur havt av grundstykkinum í alt kr. 215.090,07

**Tilmæli**:
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 215.090,07 og at lýsa grundstykkið til sølu til hægstbjóðandi.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at lýsa grundøkið til sølu alment.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>23. apríl 2015 | Blað nr.: 12224 |
| | Formansins merki: |

# 77/15 Støðulýsing av høvuðskloakknetinum hjá TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 55/15 | 15/00707-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 104/15 | 15/00707-1 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 77/15 | 15/00707-1 |

**Málslýsing:**
Í framhaldi av málinum um spillivatnsætlanina (j. nr. 14/01361) verður framhaldandi neyðugt at menna og betra kloakknetið hjá kommununi. Freistin fyri at fáa spillivatnsætlanina góðkenda var úti 1. januar 2015 og enn eru nógvar avbjóðingar, ið standa fyri framman. Arbeiði sum at separera regnvatn frá skittvatninum er ein av stóru avbjóðingunum, tí sum støðan er í løtuni, verður nógv regnvatn beint í skittvatnskloakkirnar og úrslitið er, at pumpubrunnarnir nøkta ikki at flyta tær ovurhonds stóru vatnnøgdirnar burtur. Onnur innsatsøki eru, sum tað var framlagt á evnisdegi í Norðadali á 22. oktober 2014, og eru hesi útlop, betongkloakkir og reinsiverk.

Mett verður, at fyri at kunna koma á mál við eini yvirskipaðari ætlan er neyðugt, at umsitingin saman við ráðgevum fer undir miðvísa ætlan, ið lýsir omanfyri standandi avbjóðingar og kemur við uppskoti til loysnir saman við eini kostnaðarmeting. Henda ætlan skal eisini fevna um alt veganetið hjá kommununi, soleiðis at ein ítøkiligari støðulýsing av vegum og kloakkum í kommununi kann gerast sum grundarlag fyri eini tørvslýsing og eini skipaðari raðfesting av íløgunum innan hesi øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta írestandi kr. 400.000,- av íløgukarminum fyri 2015, kto. 6875 kloakkir - til at gera eina yvirskipaða støðulýsing og arbeiðsætlan fyri anlegsarbeiði og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 22. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 78/15 Keyp av vinnubygningi á Hjalla 15, matr. 100, Hoyvík (2013-0466)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 62/14 | 14/00613-43 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 335/14 | 14/00613-43 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 96/15 | 14/00613-43 |
| 4 Býráðsfundir | 15.12.2014 | 261/14 | 14/00613-43 |
| 5 Fíggjarnevnd | 15.12.2014 | 348/14 | 14/00613-43 |
| 6 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 78/15 | 14/00613-43 |

## Keyp av vinnubygningi á Hjalla 15, matr. 100

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur havt samráðingar við Eik um at keypa vinnubygningin á Hjalla matr. nr. 100, Hoyvík.

Eik hevur ætlanir um at loysa parkeringstørvin niðan fyri bankan Yviri við Strond 4 og 6. Ynski bankans er at kunna keypa lendi frá kommununi niðan fyri bygningin.

Ein søla av nevnda lendi til Eik krevur góðkenning frá landsstýrinum, sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.

Ein samlað loysn um keyp og sølu fyriliggur, sum partarnir eru samdir um. Loysnin krevur politiska støðutakan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við at keypa bygningin á matr. nr. 1oo, Hoyvík og fíggja sambært uppskoti til fígging, j.nr. 2013-0466/2, og gera treytaða søluavtalu við Eik um lendi til parkering niðan fyri ognirnar Yviri við Strond 4 og 6.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. september 2013:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Einmælt samtykt við teirri treyt, at ætlanin um at gera gøtu fram við sjóvarrmálanum Yviri við Strond ikki verður órógvað.

**Ískoyti:**
Til tess at kunna avgreiða keypið av vinnubygninginum, áðrenn málið um lendisviðursiftini er endaliga avgreitt, er avtalað við Eik, at tað verða rindaðar 11 mió. kr. við undirskrift á skeytið viðv. matr. nr. 1oo, Hoyvík. Restupphæddin 1,5 mió. kr. fellur bert til gjaldingar, um avtalan

um lendið og avgreiðslan av lendisviðurskiftinum viðvíkjandi lendinum niðanfyri høvuðssætið hjá Eik Yviri við Strond, ikki kemur upp á pláss í seinasta lagi við árslok 2014.

Av tí at heimildin frá býráðnum snýr seg um 11 mió. kr., er neyðugt at gera eitt ískoyti til samtyktina hjá býráðnum 26. september 2013, ið heimilar kommununi at rinda 1,5 mió. kr. afturat fyri vinnubygningin á matr. nr. 1oo, Hoyvík, um avtalan um lendið Yviri við Strond ikki er avgreidd í seinasta lagi við árslok 2014.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla fíggjarnevndini til at staðfesta samtyktina hjá býráðnum 26. september 2013 við tí ískoyti, at í tann mun, at treytaða søluavtalan við Eik um lendið við høvuðssætið hjá Eik Yviri við Strond ikki ber á mál innan árslok 2014, rindar kommunan kr. 1,5 mió. afturat til Eik fyri keypið av matr. nr. 1oo, Hoyvík.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 31. oktober 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Bygningur til Lendisdeildina', L62007, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 27.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Avtalan við Eik Banka um lendið við høvuðssætið hjá bankanum er m.a. treytað av, at øll viðurskifti, s.s. byggiloyvi, loyvi frá kommunala eftirlitinum, loyvi frá friðingarmyndugleika o.l. skulu vera komin uppá pláss innan árslok 2014. Nú vit eru við árslok 2014 kann staðfestast, at flest øll loyvi eru komin, men viðgerðin í Yvirfriðingarnevndini er ikki liðug, og tí er ynskiligt, at ískoytisavtala verður gjørd, ið leingir avtalufreistina til 30. apríl 2015.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir umvegis fíggjarnevndina býráðnum til at samtykkja, at avtalan millum Eik Banka og kommununa verður longd soleiðis, at avtalan er galdandi til 30. apríl 2015.

**Fíggjarnevnd 15. december 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 15. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum nevnt í ískoytinum omanfyri, er avtalan millum kommununa og Eik Banka um lendið hjá bankanum Yviri við Strond, treytað av, at øll viðursskifti upprunaliga skuldu koma uppá pláss innan 31 des. 2014, við leingja til 30. apríl 2015, sambært samtykta ískoyti hin 15. des. 2014. Neyðugt er enn einaferð at leingja avtaluna millum kommununa og Eik Banka. Loyvið frá Yvirfriðingarnevndini er komið, men matrikulviðurskiftini eru enn ikki avgreidd og væntast kann, at tað ganga mánaðir áðrenn málið er avgreitt á matrikulstovuni, tí er ynskiligt, at enn eitt ískoyti verður gjørt, ið leingir avtalufreistina til 31. des. 2015.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir, umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til at samtykkja, at avtalan millum Eik Banka og kommununa verður longd til 31. desember 2015.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 79/15 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12: notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig

Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 80/15 Leigusáttmálar sjálvsognarstovnar á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 249/14 | 14/04311-1 |
| 2 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 250/14 | 14/04311-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 10.12.2014 | 345/14 | 14/04311-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 108/15 | 14/04311-1 |
| 5 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 80/15 | 14/04311-1 |

## Málslýsing:
Uppskot til sáttmálar verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskotum til sáttmálar og at leggja málið fyri býráðið.

**Fíggjarnevnd 10. december 2014:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlaðu leigusáttmálarnar við ávikavist Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð og Skt. Jósefs Barnagarð eru eftir umbøn støðulýsingar av bygningunum fingnar til vega. Støðulýsingarnar eru gjørdar í mars 2015. Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarði tørvar munandi ábøtur, Skt. Jósefs Barnagarður í væl minni mun.

Kommunan eigur samsvarandi eftirlitsskylduni sambært dagstovnalógini at taka upp samskifti við stovnarnar, har ætlan verður løgd til tess at fremja neyðugar umvælingar og dagføringar annars.

Uppskotini til leigusáttmálar, sum lagdir vórðu fram til fíggjarnevdnarfundin 10. september 2014, eru tillagaðir eftir samráðing við nevndirnar fyri báðar stovnar. Hesir vórðu lagdir fram á fundinum 10. desember 2014. Mælt verður til at góðkenna hesar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna leigusáttmálarnar við ávikavist Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð og Skt. Jósefs barnagarð.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

# 81/15 Keyp av Hamrabøi, matr. nr. 91a, í Kollafirði : Poul Adrian í Homrum, seljari - Broyting av byggisamtykt (2013-0884)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 18.03.2015 | 75/15 | 14/00864-32 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 109/15 | 14/00864-32 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 81/15 | 14/00864-32 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur síðani kommunusamanleggingina við Kollafjørð gjørt nógv uppskot til útstykkingar til sethús og nógvar royndir at fáa fatur á byggilendi til sethúsaútstykkingar, men hvørja ferð hevur tað víst seg at verða trupulleikar við at fáa fatur á lendinum.

Í 2004 var ætlanin at gera eina lítla útstykking á 6 grundstykkir á parti av matr. nr. 91a í Kollafirði (j.nr. 2004-0714), men heldur ikki her bar til at fáa fatur á byggilendinum. Men nú hevur Poul Adrian í Homrum, festibóndi, boðið kommununi at keypa Hamrabøin matr. nr. 91a, grundað á at hann ikki longur hevur mjólkineyt og bøurin tí ikki verður røktur. Avtalað varð, at TK ger eitt uppskot og vendir aftur til Búnaðarstovuna og Poul Adrian í Homrum.

Ein lítil partur av ognini liggur í A1- sethúsaøki og restin liggur í D1-øki og 4 gr. Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til broyting av byggisamtyktini og útstykking av økinum til 23 grundstykkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at almenna byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali, dagfest 1. mai 2013.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Somuleiðis avgjørdi nevndin at heita á fíggjarnevndina at søkja Búnaðarstovuna um at keypa matr. nr. 91a.

**Ískoyti.**
Kommunan hevur havt samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi, sí omanfyri.

Búnaðarstovan er sinnað at selja kommununi lendið. Og skal kommunan rinda ásettan prís, sambært kunngerð um festi og harumframt endurgjald fyri fjósið.

Sí notat 2013-0884/4

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til, at keypa lendið við ástandandi fjósi. Keypið verður játtað av konto 6175.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta pening til keyp av lendi av konto 6175, keyp av lendi.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Málið umrøtt og samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Málið útsett.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Tikið av skrá.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>23. apríl 2015 | Blað nr.: 12234<br><br>Formansins merki: |

# 82/15 Val av bygginevnd til svimjihøll til 50 metra hyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 82/15 | 15/01401-1 |

**Málslýsing**:
**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Jógvan Arge og Bogi Andreasen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Bogi Andreasen.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at avtaka nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

## 83/15 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Rúni Djurhuus | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørg Dam | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún Amalia Mohr | |